


*Páll á Reynatúgvu, fyrrverandi borgarstjóri á Sandi, ætlar saman við øðrum at fara undir virksemi í Skálavík, men kommunustýrið í Skálavík vil ikki hava tey at koma, uttan so at virksemið verður fiskavirking. Bygningurin varð áður brúktur til fiskavirking, men tað fekst ikki at bera til.*

*Mynd: savnsmynd*

# Dómarin legði upp til semju

**EIGARAVIÐURSKIFTI Kommunustýrið í Skálavík heldur fast við, at vinnubygningurin, ið Lido átti, bara kann brúkast til fiskaframleiðslu. Eigararnir hava aðrar ætlanir. Roynið at semjast, segði dómarin, tá ið málið var fyri í rættinum mánadagin**


## Náttarvakt til SMS

Søkt verður eftir fólki M/K, til at arbeiða sum náttarvakt í SMS, aðru hvørja viku, at byrja skjótast tilber. Vit sóknast eftir einum ágrýtnum, fyrikomandi og dugnaligum fólki. Vit vænta av tær at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni.

**Vit gleða okkum at hoyra frá tær...**

sms

Vilt tú vita meira, ert tú vælkomin at ringja til Karis á tel 52 16 17 ella senda ein teldupost til karis@sms.fo


Randi Jacobsen

Tað er framvegis ógreitt, um nakar møguleiki er fyri virksemi í vinnubygninginum, sum Lido í sínari tíð læt byggja í Skálavík. Skálavíkar kommuna helur fast við, at bygningurin bara skal brúkast til til fiskavirking, men eigarnir hava ella hava í hvussu er havt ætlanir um at brúka húsið sum sláturvirki.

Hetta løgna málið var fyri í rættinum mánadagin, og rættarfundurin endaði við, at dómarin heitti inniliga á partarnar um at royna semju. Freistin varð sett til 12. juli, og hava teir ikki til ta tíð gjørt semju, verður dómur sagdur.

### Søgan um bygningin er hendan:

Upprunaliga stovnaði Linjohn Christiansen, sum samstundis var borgarstjóri, saman við øðrum fyritøkuna Lido. Hetta var í kreppuárunum, og húsið varð bygt fyri ein stóran part við sjálvbodnari arbeiðsmegi. Kommunan átti grundina, og virkið hevði leigusáttmála við kommununa um undirlendið men rindaði onga leigu.

Virkið kom ongantíð veruliga í gongd. Útnorðurgrunnurin kravdi so virkið selt á tvingsilssølu, og tá fekk grunnurin eitt bræv frá Skálavíkar kommunu, sum hevði slept treytini í leigusáttmálanum um, at bygningurin bert kundi hýsa fiskavirking.

Skálavíkar kommuna visti ikki av fyrr enn aftaná, at Páll á Reynatúgvu sjálvur fjórði hevði keypt bygningin, og nýggju eigararnir gjørdu greitt, at teir høvdu ætlanir um annað virksemi enn fiskavirking.

Kommunustýrið í Skálavík segði leigusáttmálan upp og vendi aftur til treytina um, at virkið bara kundi brúkast til fiskavirking.

### Treytirnar

Páll á Reynatúgvu og hinir eigararnir stevndu Skálavíkar kommuna at viðurkenna, at fiskavirking ikki er nøkur treyt.

Sakførarin hjá nýggju eigarunum helt í rættinum, at Skálavíkar kommuna ikki kundi sleppa tilsøgnini um at sleppa kravinum um fiskavirking aftur. Hann helt alt málið snúgva seg bara um persónar, at nýggju eigarnir høvdu skeiv nøvn og sipaði her til, at skálvíkingar ikki vildu hava Páll á Reynatúgvu at koma til Skálavíkar at reka virksemi.

Mótpartruin segði hinvegin, at ein kommuna sjálv má hava rætt til at ráða fyri, hvat eitt virki á hennara grund tekst við. Linjohn Christiansen helt ikki skrivligu tilsøgnina frá kommununi um at sleppa kravinum um fisksavirking hava so stóran týding. Tilsøgnina hevði varaborgarstjórin givið einsamallur. Kommunustýri var framvegis samt um, at bygningurin skal brúkast til fiskavirking.

Dómarin helt hetta málið vera trupult at loysa. Núverandi eigararnir sleppa ikki at brúka húsið, tí kommunan setir sum treyt, at húsið kann bara brúkast til fiskavirking.

Ein møguleiki er at taka húsið niður.

Nú hava partarnir so nakrar vikur at umráða seg í. Páll á Reynatúgvu og tey hava ongar ætlanir um fiskavirking. So antin sleppur Sjkálavíkar kommuna kravinum um, at húsið bara kann brúkast til fiskaframleiðslu. Ella verður húsið tikið niður og flutt úr Skálavík.

*randi@sosialurin.fo*